# Litrík Várfest



Í gjár var Várfest í miðbýnum í Havn. Tiltakið byrjaði kl. 15. við skrúðgongu frá Frelsunarherinum oman á Vaglið. Fremst gekk hornorkestur Frelsunahersins, síðan komu tey, sum skuldu luttaka í tiltakinum, og aftast koyrdu motorsúkklur frá Cross Bikers MC Føroyar.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, setti Vársfestina, síðani vóru fleiri leikir framførdir við kendum søgum í Bíbliuni.

Uppboðssølan av málningum byrjaði kl. 17.30. Nakrir av málningunum vórðu málaðir á Vaglinum, samstundis sum tiltakið fór fram. Avlopið av uppboðssøluni fer til Tilhaldið í Tórsgøtu.

Familjutiltak var í salinum hjá Frelsunarherinum, og eitt ungdómstiltak var í teltinum á Vaglinum, har fleiri tónleikabólkar framførdu.

Fyrireikararnir siga, at hóast veðrið ikki var heilt eftir vild, eydnaðist tiltakið væl. Uppboðssølan fekk góða undirtøku, og boðskapurin hevði sína ávirkan.

*mg*



*Myndir:*
*Álvur Haraldsen*
*Magnus Gunnarsson*













